# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kommunuval

Valið í morgin er sermerkt og søguligt. Hetta er ivaleyst seinasta kommunuval við teimum nógvu smáu kommununum, og tá farið verður á bý- og bygdaráðsval næstu ferð, vera tað neyvan fleiri enn sjey ella í mesta lagi níggju kommunur í landinum. Kommunala sjálvstýrið er yngri enn løgtingið, men fyri tí hevur tað ikki minni týdning fyri borgaran.

Hugmyndin aftan kommunala sjálvstýrið er, at avgerðir, sum hava týdning í lokalsamfelagnum, skulu verða tiknar so nær borgaranum sum gjørligt. Hetta sigst vera ein orsøkin til, at vit fingu so nógvar smáar kommunur. Upprunaliga fylgdu kommunumørkini at kalla sýsslumørkunum, og vit høvdu fáar men stórar kommunur. Men við tí undirstøðukervi, sum tá var, áðrenn vit fingu vegirnar millum bygdir, var henda skipa tung og trupul, so hon varð upployst í 52 smærri og størri eindir.

Tíðin er nú farin frá eini skipan við nógvum smáum og meðalstórum kommunum. Orsøkirnar ery fleiri. Vit hava fingið eitt sera vælútbygt undirstøðukervi og politiska rákið gongur móti útleggingum. Hetta merkir við øðrum orðum, at nógvar av teimum almennu uppgávunum, sum alt síðan 1948 hava verið landsuppgávur, fara at verða lagdar út til kommunalar myndugleikar at fyrisita. Sama rákið er um øll Norðurlond. Hóast royndirnar av hesi skipan yvirhøvur eru góðar, so hava ávísir trupulleikar verið staðfestir serstakliga innan barna- og ungdómsøki so væl sum eldraøkið. Orsøkirnar til hesar trupulleikar kunnu í flestu førum rekjast aftur til fíggjarlig viðurskifti. Kommunurnar hava verið ov fíggjarliga veikar at megna at lyfta tær nýggju uppgávurnar til lítar. Okkara lóggevarar og landsmyndugleikar eiga tí at læra av hesum og síggja til, at neyðturviligt fíggjarligt tilfeingi fylgir við ella kann útvegast, tá stórar landsuppgávur verða lagdar út til bý- og bygdaráðini at fyrisita. Um ansað verður væl eftir á hesum øki, og útleggingin verður væl fyrireikað og væl fyriskipað, fer henda skipan ivaleyst at verða til gagns fyri borgararnar.

Kommunala sjálvstýrið er ein sera týðandi partur av fólkaræðiligu skipan okkara. Tað hevur tí týdning, at veljararnir taka hetta valið í líka stórum álvara sum løgtingsvalið. Tá nýggja skipanin er framd og kommunala sjálvstýrið hevur verið ígjøgnum tær bygnaðarbroytingar, sum liggja í kortunum, fara bygda- og býráðini at hava eins stóra ávirkan á gerandisdagin og løgting og landsstýri hava í dag. Tað er tí av stórum týdningi fyri fólkaræðið, at veljararnir møta fjølmentir á valinum í morgin, soleiðis, at vit, tá valið er av, kunnu vísa á metstóra valluttøku. Her er eisini annar spurningur av demokratiskum týdningi. Vit hugsa um skeiva kynsbýti í okkara bý- og bygdaráðum. Veljarin eigur í morgin at hava hetta í huga soleiðis, at valið í morgin eisini verður valið, sum tryggjaði eina meira demokratiska samanseting av okkar bý- og bygdaráðum soleiðis, at hesir stovnar í framtíðini fara at endurspegla býtið millum kvinnur og menn í samfelagnum annars. Gott val í morgin øll somul!

**Sosialurin**

## Hovedaktionæransvar – også en slags ansvar



JØRN ASTRUP HANSEN
Formand for Búskaparráðið

Med kort frist blev Búskaparráðið den 6. november 2008 bedt om over for lagtinget at gøre bemærkninger til landsstyrets forslag om at lade landskassen tegne 30 mio. kr. aktiekapital i P/F Smyril Line i forbindelse med en finansiel rekonstruktion af rederiet.

Ifølge lovforslaget kommer landsstyret sammen med Framtaksgrunnurin til at kontrollere 59 pct. af aktiekapitalen i P/F Smyril Line, og landsstyret har med en aktionæraftale med Framtaksgrunnurin sikret sig retten til at udpege et flertal af bestyrelsens medlemmer.

Med kapitalindskuddet og aktionæraftalen påtager landsstyret sig efter Búskaparráðiðs bedste opfattelse et hovedaktionæransvar for P/F Smyril Line. Et sådant ansvar er ikke reguleret i aktieselskabsloven. Ansvaret er af moralsk, og politisk, karakter. Men ansvaret er ikke desto mindre en realitet – a fact of life. Netop hos færøske lagtingspolitikere turde man dog forudsætte et solidt kendskab til begrebet hovedaktionæransvar.

I 1987 satte landskassen en beskeden aktiekapital i P/F Atlantsflog. I årene derefter måtte landkassen som hovedaktionær jævnligt øge sit engagement i P/F Atlantsflog, når selskabets kasse truede med at løbe tom.

For netop et år siden påbegyndte landsstyret med et salg af 1/3 af aktiekapitalen en privatisering af P/F Atlantsflog. At hensigten med privatiseringen netop var at frigøre landskassen fra hovedaktionæransvaret fremgår klart af bemærkningerne til lovforslaget. Det hedder således i bemærkningerne, at formålet med at privatisere P/F Atlantsflog er

*at loysa landskassan frá verandi váða og ábyrgd fyri verandi og komandi íløgum.*

• Med udtrykket váða og ábyrgd refereres netop til hovedaktionæransvaret. Andet ansvar har (og havde) landskassen dog ikke for P/F Atlantsflog.

• Skulle hovedaktionæransvaret fortsat forekomme lidt abstrakt, så erhvervede Finansieringsfonden den 22. marts 1993 for 3 mio. kr. (og en post aktier i P/F Sjóvinnubankin, der senere blev nedskrevet til nul) fra Danske Bank 52 pct. af aktiekapitalen i P/F Føroya Banki.

• Herved pådrog Finansieringsfonden landsstyret et hovedaktionæransvar. Den 29. november 1993 fangede bordet. Landsstyret måtte dække et tab på 1.026 mio. kr. i P/F Føroya Banki. Landsstyret vedkendte sig hovedaktionæransvaret, uagtet landstyret ikke var forpligtet i juridisk forstand.

At landsstyremyndighederne mentalt er i færd med at påtage sig et hovedaktionæransvar i P/F Smyril Line fremgår klart af Vinnunevndins betænkning, hvorefter

*at tað fer at skaða umdømi okkara aðrastaðni, um ferðafólkasamband okkara verður niðurlagt ella fer á útlendskar hendur.*

• Lover lagtinget ikke her at holde Norröna flydende og at fastholde ejerskabet til P/F Smyril Line på færøske hænder?

Det må overraske, at Vinnunevndin i sin betænkning af 7. november 2008 vælger at karakterisere Búskaparráðiðs omtale af hovedaktionæransvaret som "faktuelt forkert". Man vil da helst ikke tro, at Vinnunenvdin har ladet sig rådgive af P/F Smyril Lines advokat.

## Tøkk til Tórshavnar Býráð

HELGI NIELSEN
í Svanga 14
100 Tórshavn

Nú valskeiðið hjá sitandi býráðið er um at vera runnið, vil eg við hesum senda limunum í Tórshavnar Býráð eina tøkk.

Býráðið hevur seinastu tvær seturnar nærum dagliga kunngjørt ymisk átøk, sum eru gjørd í ymisku býarpørtunum og bygdunum í kommununi. Har eru komin sparkivallir, spælipláss og annað mennandi fyri trivnaðin í økjunum. Hetta er sjálvandi gleðiligt fyri teir skattaborgarar, sum eru so hepnir at fáa gagn av hesum átøkum.

Tað eru tó ikki allir skattaborgarar í Tórshavnar Kommunu sum verða vælsignaði við slíkum átøkum. Í býarpartinum "í Svanga" eru flestu húsini bygd í 90'unum, og eru meginparturin av íbúgvunum í Svanga barnafamiljur. Hóast hetta hevur Tórshavnar Býráð ikki megnað nakað sum helst, tá um trivnað ræður, tað veri seg hjá børnum ella vaksnum.

Her er framvegis eingin sparkivøllur, hóast býráðið sigur seg hava arbeitt við hesum í yvir átta ár, og peningur varð settur av fyri fleiri árum síðani. Her er ikki so frægt sum ein fløta til bóltspæl. Her er heldur einki spælipláss til børnini, annað enn gamli vatnbrunnurin, sum børnini kunnu njóta góðu summardagarnar. Vegirnir í Svanga eru í sera vánaligum standi – seinasta slitlagið av asfalti er ongantíð lagt á, og sum heild eru teir illa frágingnir. Stutt sagt kunnu skattaborgarar í Svanga av røttum kenna seg hava sera lágt virði fyri býin.

Hetta ljóðar kanska sum grenj, men tá vit seinastu átta árini á hvørjum ári hevur lovað børnunum, at nú kemur sparkivøllurin ella spæliplássið, men einki hendir, so er ringt ikki at grenja. Vit hava óteljandi ferðir gjørt vart við hetta á røttum stað, men alt til fánýtis – "arbeitt verður við málinum" er standardsvarið.

Tí vil eg hervið takka fráfarandi býráði fyri innsatsin, ella rættari - mangul upp á sama. Fyri okkum í Svanga kann tað bara gerast betri, og tí vóni eg, at nýtt fólk kemur til valdi í Tórshavnar Býráð. Fólk sum vilja arbeiða fyri trivnaði í øllum pørtum av Tórshavnar Kommunu – ikki bara við orðum, men eisini í verki.

Gott val!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.